# Kristoffur ætlar at verða sakførari



**Í 9. d á Eysturskúlanum gongur ein drongur, sum eitur Kristoffur Kristoffersen. Hann er í starvsvenjing hjá Advokatfelagnum yviri við Strond og ætlar sær at gerast sakførari**

STARVSVENJING

*Orð og mynd: Elin Brimnes og Rúna Andreassen, praktikantar*

**Hví valdi tú júst hettar staðið?**
*Tí at eg ætli mær at verða sakførari, tá eg verði vaksin.*

**Hvat gera tey har?**
*Tey arbeiða fyri kundan, t.d. verja viðkomandi í rættinum.*

**Hvat gert tú?**
*Eg hjálpi skrivaranum og sakførarunum við sakum.*

**Hvussu dámar tær har?**
*Mær dámar ógvuliga væl.*

# Tað rular hjá grannskoðaranum




**Heini Winther Johnsen gongur í 9. a í Eysturskúlanum. Hann er í starvsvenjing hjá grannskoðarafelagnum Spekt**

STARVSVENJING

*Orð og mynd: Elin Brimnes og Rúna Andreassen, praktikantar*

**Hví valdi tú júst hettar staðið?**
*Tí at pápin hjá systkinabarninum hjá babba gav mær íblástur. Hann er grannskoðari í Danmark, og eg havi altíð hildið, at tað hevur verið spennandi, og eg vildi sleppa, at vita meir um, hvat tey gera.*

**Hvat gera tey har?**
*Tey gera so nógv ymiskt. Millum annað halda tey roknskap hjá fólkum ið ætla sær at stovna eitt felag ella hava ein handil.*

**Hvat gert tú?**
*Eg printi pappír og eg oyðileggi pappír. Eisini hjálpi eg teimum, ið arbeiða her við tí, eg kann.*

**Hvussu dámar tær?**
*Hetta rular!*

**Hvørjum vilt tú arbeiða við í framtíðini?**
*Eg veit ikki ordiliga. Tað skal verða okkurt sálarligt arbeiði, ikki kropsligt. Møguliga grannskoðari.*

# Gera klárt til plantusøluna



**Rakul Á. Jakobsen gongur í 9. a í Eysturskúlanum. Hon er í starvsvenjing hjá Skógrøkt Landsins**

STARVSVENJING

*Orð og mynd: Elin Brimnes og Rúna Andreassen, praktikantar*

**Hví valdi tú júst hettar staðið?**
*Tí eg vildi sleppa onkustaðni, har eg kundi gera okkurt, ikki bara sita á afturpartinum. So segði ein vinmaður, at her var ordiliga gott, so hví ikki?*

**Hvat gera tey her?**
*Tey framleiða runnar og trø, ið eru serliga góð til tað føroyska veðurlagið. Beint nú verður gjørt klárt til plantusøluna, ið byrjar 28. apríl.*

**Hvat gert tú?**
*Eg flyti plantur oman í plantusøluna, eg vatni plantur og taki ókrút upp, og eg potti.*

**Hvussu dámar tær?**
*Mær dámar super væl. Her er nógv at gera, fitt fólk og deiliga frískligt.*
*Øðrvísi enn ein vanlig skúlagongd.*

**Hvørjum vilt tú arbeiða við í framtíðini?**
*Eg veit ikki. Hetta kundi kanska verðið nakað av tí.*

# Svarar til vónirnar



**Philip Jacobsen gongur í 9. a í Argja skúla. Hann er í starvsvenjing hjá Yndi Fitness**

STARVSVENJING

*Orð og mynd: Elin Brimnes og Rúna Andreassen, praktikantar*

**Hví valdi tú hetta staðið?**
*Tað var tí, at eg visti um onkran sum hevði verið her fyrr, og teimum dámdu ógvuliga væl. Sjálvur havi eg eisini altíð viljað arbeitt við onkrum slíkum.*

**Hvussu dámar tær?**
*Mær dámar væl. Tað hevur livað upp til mínar væntanir og vónir, so eg kann ikki klaga.*

**Hvat gera tey her?**
*Tey vaska maskinurnar, vaska gólvini. Eisini selja tey proteindrykkir o.t., og so sjálvandi vegleiða øllum, sum koma at venja, um maskinurnar o.a.*

**Hvat gert tú?**
*Eg geri nakað tað sama sum starvsfólkini gera. Tá kundar koma, leiði eg teir oftast til starvsfólkini, uttan tá ið teir bara skulu keypa okkurt.*

**Hvørjum vilt tú arbeiða við í framtíðini?**
*Tað verður okkurt, ið líkist hesum. Kanska ikki akkurát her, men uttanlands. Eg hevði eisini væl tíma at verið persónligur venjari.*

